# MUSIKKSKÚLA MIÐNÁM

## Yvirskipaðar námsætlanir

INNIHALD:

Fororð

Um námsætlanir

Klassisk deild

Rútmisk deild

Framleiðsludeild

# FORORÐ

**Endamál**

Endamálið við musikkskúla miðnámi er:

- at geva áhugaleikarum í Føroyum eina holla tónleikaútbúgving.
- at næmingurin fær kunnugleika, vitan og førleikar fyri at útinna og skapa tónleik.
- at geva næmingum ein møgulieiki at rannsaka og menna síni tónleikaligu evni við støði í høvuðsljóðførinum, stuðla av tilhoyrandi hjálærugreinum.
- at fyrireika evnaríkar næmingar til nám á hægri tónlistaskúla.
- at stimbra tónleikalívið í Føroyum.

**Visjón**

Musikkskúlamiðnámsútbúgvingin er ein 3 ára tónleikaútbúgving, ið gevur framkomnum næmingum eitt skipað undirvísingartilboð á miðnámsstigi. Tað er Tórshavnar Musikkskúli, sum bjóðar út og skipar frálæruna í Musikkskúlamiðnám.

Visjónin er at musikkskúla miðnáms útbúgvingin er framrættað, og at útbúgvingin megnar at røkja og menna undirvísingina av ungum tónleikatalentum í samstarvi við musikkskúlar og aðrar viðkomandi samstarvsfelagar í Føroyum og uttanlanda.

**Yvirskipað mið fyri læruúrtøku í musikkskúla miðnámi**

Næmingur í musikkskúla miðnámi fær frá byrjan bjóðað eina trý ára skeiðstíð, sum er listaliga og handverksliga grundað. Hetta merkir at musikkskúla miðnám gevur næminginum grundleggjandi vitan, fimi og førleikar til tess at kunna íðka og skapa tónleik. Útbúgvingin gevur næminginum grundarlag fyri upptøku á hægri tónleikaútbúgving.

- Musikkskúla miðnám gevur næminginum møguleika at granska og menna sítt tónleikavirki við støði í aktuella høvuðsfaksøkinum.
- Næmingurin verður tilvitaður um egið tónlistaligt úttrykk og tónlistaligu eginleikarnar í ljóðførinum, og skilir at íðka og menna hetta við listaligari megi og fatan av tónlistaligari heild.
- Næmingurin megnar at tónseta, improvisera, niðurskriva og framleiða egnan tónleik og grunda yvir egnan tónleik, eins og tónleik hjá øðrum.
- Næmingurin er førur fyri at taka støðu til tónleik og til egnan tónlistaligan samleika í einum søguligum, samfelagsligum og vinnuligum sjónarhorni, og kann skapa yrkisroyndir fyri sítt tónlistaliga virksemi.

Eftir loknan lestur í msuikkskúlam miðnámi hevur einstaki næmingurin ognað sær hesa læruúrtøku:

**Vitan**

Einstaki næmingurin skal:

- hava vitan um tónleikafakliga praksis, háttaløg og ástøði, sum mynda tónleikavirki í einum modernaðum, globaliseraðum heimi.
- kunna skilja og grunda yvir tónleikafakliga praksis, háttaløg og ástøði
- hava kunnleika um møguleikarnar fyri hægri tónleikaútbúgving

**Fimi**

Einstaki næmingurin skal:

- kunna nýta tónleikafaklig háttaløg, amboð og listaformar eins og almennan kunnugleika, ið knýta seg at aktivari luttøku í tónleikalívinum
- kunna meta um tónleikafakligar avbjóðingar og spurdómar, umframt kunna nýta viðkomandi loysnafrymlar og taka skikkaðar listaligar avgerðir
- kunna miðla tónlistalig úttrykk og tónleikafakligar spurdómar til bæði yrkisfelagar og ikki-spesialistar

**Førleikar**

Einstaki næmingurin skal:

- kunna ásanna og handfara skapandi avbjóðingar í menningini og útinnanini av einum tónleikavirki í einum globaliseraðum heimi
- kunna stíga fram í tónlistaligum samanhangum við einum persónligum úttrykki
- kunna vera partur av tónlistaligari samvirkan og í tvørfakligum samstarvi á semiprofessionellum støði
- kunna eyðmerkja egnan lærutørv og skapandi menningarmøguleikar og arbeiðsavrik í mun til gerandisdagin og til eina møguliga hægri tónleikaútbúgving
- á hollan hátt kunna søkja um upptøku á eini hægri útbúgving

# UM NÁMSÆTLANIR

Hjálagda námsætlan fyri musikkskúla miðnám er tað sum einstaki næmingurin væntast at røkka gjøgnum undirvísingina.

Tað avgerandi í námsætlanarhugsanini er *førleikahugtakið*, og námsætlanirnar lýsa, hvørjar førleikar ein næmingur væntast at røkka, tá ein er farin gjøgnum eina undirvísingargongd.

Karmurin fyri námsætlanirnar fyri  musikkskúla miðnám skilir millum vitan, fimi og førleikar:

- *Vitan* fevnir um faktuella vitan, ástøðiliga og hugtaksliga vitan, framferðar- ella frumregluvitan og praktiska vitan
- *Fimi* fevnir um nýtslu av tilognaðari vitan og knowhow til tess at útinna uppgávur og uppgávuloysn
- *Førleikar* fevna um nýtslu av vitan og fimi (persónligt, sosialt og háttabundið), íroknað førleikan at kunna grunda yvir vitan og fimi

Førleikar verða mentir gjøgnum vitan og fimi, umframt hugburðir og virði í einum sínámillum og skiftivirknandi samanspæli. Málið fyri vitan og fimi er grundarlag fyri teimum førleikum, ið næmingarnir væntast at tilogna sær.

*Yvirskipaðu førleikamálini* lýsa hvat ein miðal-næmingur væntast at duga eftir at hava gjøgnumført undirvísingina í einum givnum faki á musikkskúla miðnami eftir lokið prógv.

Fyri hvørt yvirskipað førleikamál verður ein ávís nøgd av undirskipaðum málum allýst, ið skal vísa hvat næmingurin væntast *duga* (fimismál) og *vita* (vitanarmál) til tess at røkka førleikamálinum. Hesi málpør lýsa yvirskipaðu førleikamálini fyri hvørt førleikaøki gjøllari.

# KLASSISK DEILD

## HØVUÐSLJÓÐFØRI

**Endamál**

Menning av teknisku og tónlistaligu førleikunum á høvuðsljóðførinum. Dentur verður lagdur á, at menna næmingin sum solist og emsembletónleikara.

**Innihald**

Tónlistaliga medvitið, úttrykkið og tekniska yvirskotið hjá næminginum verður ment gjøgnum virki innan:

- tónlistaligt úttrykk
- tekniskar førleikar
- venjingarteknikk
- repertoire/tónleikaskrá
- sjangrukunnleika og sjangrufatan
- framførslu og miðlan

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónlistaligt úttrykk | *Næmingurin er tilvitaður um egið persónligt tónlistaligt úttrykk, og dugir at íðka og menna tað.* | Næmingurin kann spæla við persónligum og margbroyttum úttrykki. | Næmingurin hevur vitan um ymisk tónlistalig úttrykk. | Næmingurin kann meta um og menna egið tónlistaligt úttrykk. | Næmingurin er tilvitaður um tørvin á sjálveftirmeting. | | |
| Teknisk fimi | *Næmingurin kann íðka tónleik við sannførandi ljóðføristeknikki og gagnligari kropsnýtslu.* | Næmingurin kann spæla við sannførandi teknikki. | Næmingurin er tilvitaður um teknisku avbjóðingarnar í ljóðførinum og um tørvin á støðugari tekniskari dugnaskapsgerð. | Næmingurin kann spæla við gagnligari kropsnýtslu. | Næmingurin er tilvitaður um ergonomi og gagnligan kropsburð. | | |
| Venjingarteknikkur | *Næmingurin kann venja verk sjálvur og saman við øðrum, eins og meta og bøta um egið avrik.* | Næmingurin megnar munagóða og gagnliga venjingarpraksis. | Næmingurin hevur kunnleika til venjingarteknikkir. | Næmingurin kann menna venjingarteknikk. | Næmingurin kann grunda yvir ávirkanina av egnari venjing. | Næmingurin kann nýta egnar og annara førleikar til at røkka einum felags venjingarmiði. | Næmingurin hevur vitan um sín egna leiklut í samband við venjing saman við øðrum. |
| Tónleikaskrá/Repertoire | *Næmingurin dugir eina fjølbroytta tónleikaskrá innan viðkomandi sjangrur og stílsløg.* | Næmingurin dugir eina sjangrubreiða og fjøltáttaða tónleikaskrá á sínum ljóðføri. | Næmingurin hevur kunnleika til eina fjøltáttaða tónleikaskrá innan ymisk tíðarskeið og stílsløg. | Næmingurin er uppleitandi í arbeiðinum at gerast kunnigur við tónleikaskránna hjá ljóðførinum. | Næmingurin kennir til viðkomandi tónleikasøguligar keldur, innspælingar og nótaútgávur, eins og møguleikarnar fyri at fáa fatur í teimum. | | |

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sjangrukunnleiki og sjangrufatan | *Næmingurin kann spæla sjálvstøðugt og skikkað í mun til tónlistaligar sjangrur og siðvenjur.* | Næmingurin kann menna sín egna tónlistaliga profil gjøgnum virkið samspæl við ymsar sjangrur og siðvenjur. | Næmingurin er kunnigur við ymsar tónlistaligar sjangrur og siðvenjur. | | | | |
| Framførsla og miðlan | *Næmingurin kann á sannførandi hátt forloysa sítt tónlistaliga úttrykk og miðla tónleik í ymiskum konsertstøðum.* | Næmingurin megnar at samskifta sín tónleik til áhoyrarar á ymsan hátt | Næmingurin hevur kunnleika til ymsar miðlahættir | Næmingurin kann fyrireika seg mentalt til at avrika í eini konsertstøðu | Næmingurin hevur kunnleika til venjingar til tess at varðveita mentalt fokus | | |

## SAMANSPÆL

### Endamál

- Menning av førleikunum hjá næminginum sum tónleikari í einum ljómliði – bæði sum solistur og sum fylgispælari/medleikari.
- Fatan av leiklutinum hjá einstøku ljóðførunum, og evnið at lurta eftir egnum og annara spæli í samanspælsstøðuni.

### Innihald

Undirvísingin í samanspæli fer fram í hóskandi samansettum ljómliðum, sum í mest møguligan mun røkja bæði kamartónleik og orkesturspæl. Arbeitt verður við:

- tónlistaligum felagsskapum
- samskiftisligu eginleikunum hjá ljóðførinum

- tónleikaskrá/repertoire
- tónlistaligum leiklutum

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Førleikamál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Førleikamál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónlistaligir felagsskapir | *Næmingurin er førur fyri at seta í gongd og gerast partur av bindandi tónlistaligum felagsskapum.* | Næmingurin tekur av sínum eintingum stig til ymisk sløg av samstarvum og skapar tónlistalig netverk. | Næmingurin er tilvitaður um týdningin av samanspæli og netverki. | Næmingurin kann saman við øðrum seta mál og á konstruktivan og ábyrgdarfullan hátt geva ískoyti til felags arbeiðsgongdina. | Næmingurin er tilvitaður um at taka ábyrgd fyri egnum ískoyti til felags stevnumiðið og arbeiðsgongdina. | Næmingurin kann gera avtalur, ráðleggja og gjøgnumføra royndargongdir og geva eitt virki ískoyti til ráðlegging av konsertum. Næmingurin kann samskifta hóskandi í einum samstarvi og reagera konstruktivt uppá ósemjur. | Næmingurin hevur vitan um týdningin av gjørdum avtalum. Næmingurin hevur kunnleika til felags frøðimál (terminologi) og grundleggjandi vitan um bólkadynamikk og ósemjuloysn. |
| Tónlistaligu og samskiftisligu eginleikarnir hjá ljóðførinum | *Næmingurin er tilvitaður um eyðkenni hjá ljóðførinum, samt tess funksjón í eini tónlistaligari heild.* | Næmingurin kann spæla við einum smidleika, soleiðis at ljóðførið ljómar hóskandi í samspæli við øðrum. | Næmingurin kennir sereyðkennini fyri bæði sítt egna ljóðføri og fyri ljóðførini hjá medspælarum. | | | | |

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Førleikamál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Førleikamál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónleikaskrá/Repertoire | *Næmingurin hevur breiðan kunnleika til kjarnutónleikaskrá ljóðførisins.* | Næmingurin kann spæla viðkomandi verk innan kamartónleik og orkesturbókmentirnar. | Næmingurin hevur kunnleika til eina fjølbroytta tónleikaskrá innan ymisk tíðarskeið og stílsløg í kamartónleiki og orkesturbókmentum. | Næmingurin er uppleitandi í arbeiðinum við at gerast vælkendur við tónleikaskránna hjá sínum ljóðføri innan kamartónleik og orkesturbókmentir. | Næmingurin kennir til viðkomandi tónleikasøguligar keldur, innspælingar og nótaútgávur, umframt møguleikunum fyri at fáa fatur í hesum. | | |
| Tónlistaligir leiklutir (solistur, fylgispæl/medspælari, tónlistalig heild) | *Næmingurin kennir sín leiklut í tónleikinum og megnar at virka smidliga og samskiftandi í tónlistaliga samanhanginum.* | Næmingurin kann spæla smidliga í eini samanspælsstøðu út frá eini yvirskipaðari fatan av tónleikinum. | Næmingurin skilur bæði sín egna leiklut og leiklutin hjá sínum medspælarum í heildini. | Næmingurin kann virka hóskandi og konstruktivt í eini samanspælsstøðu. | Næmingurin fatar týdningin av at laga seg til samanspælsstøðuna. | Næmingurin kann geva sítt ískoyti til hina felags tulkingina. Næmingurin megnar at samskifta sína tónlistaligu ætlan til bæði medspælarar og áhoyrarar. | Næmingurin fatar týdningin av at geva pláss til eina felags tulking av tónleikinum. Næmingurin hevur vitan um kropsmál/orðleyst samskifti og tónleikamiðlan. |

## HJÁFAKSKLAVER

### Endamál

At næmingar, sum ikki hava klaver sum høvuðsljóðføri, tilogna sær grundleggjandi fimi í egnum spæli, og menna førleikar í mun til ástøði, harmoni/samljóð og fylgispæl.

### Innihald

Gjøgnum arbeiði við viðkomandi tónleikaverkum mennist:

- hóskandi teknikkur
- nótalesing, talsetuspæl
- samskipan, klangur/dynamikkur

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Mál: Fimismál | Mál: Vitanarmál |
|---|---|---|---|
| Tónlistaligur profilur | *Næmingurin hevur klaverfimi og yvirlit yvir klaverið á einum støði, ið ger nýtslu av klaverinum gjørliga sum eitt praktiskt hjálpartól og samstundis styrkir generellu ástøðiligu/stílistisku fatanina hjá næminginum, umframt fatan av harmonikki, samspælinum millum ymsar tónlistaligar leiklutir (fylgispæl, lag osfr.) og fleirraddan.* | Næmingurin fær brúkt sítt klaverfimi á persónligan og sjálvstøðugan hátt, ið hóskar seg stílistiskt og praktiskt við yvirskipaðu málini hjá næminginum í musikkskúla miðnámi. | Næmingurin er tilvitaður um brúksmøguleikar av egnum klaverfimi og kann samantvinna teir í sínum savnaða tónlistaliga virki. |
| Praktisk nýtsla av klaverinum | | Næmingurin megnar at brúka sítt tilognaða klaverfimi í viðkomandi samanhangum, og sum yvirlitsskapandi amboð í sínum tónlistaliga virki. | Næmingurin kennir til ymiskar brúksmøguleikar á klaverinum, og tey av hesum útloystu krøvini innan viðkomandi sjangrur og stílsløg. |
| Klavertekniskt fimi | | Næmingurin hevur handverksligt fimi á einum grundleggjandi støði til eitt breitt úrval av elementum innan klaverspil (hóskandi teknikk, nótalesing, talsetuspæl, samskipan, klang/dynamikk osfr.) | Næmingurin er tryggur við ymiskar venjingarteknikkir og strategiir til tess at loysa ymsar uppgávur, sum eru viðkomandi fyri klaverið. |

# HOYRILÆRA

**Endamál**

Menning av tónlistaliga tilvitinum hjá næminginum umvegis arbeiðið við tónhoyrn, lesiførleika og fatan av viðkomandi ástøðiligum hugtøkum - við atliti at tónlistaligari íðkan.

**Innihald**

Tilognan av audtitivum, ástøðiligum og uppskrivingarligum fimi innan lagskipan (melodikk), rútmulæru og harmonikk

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2 + 3: Fimismál | Ár 2 + 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|
| Lag | *Næmingurin hevur sterka innara tónhoyrn, eins og gott fimi innan nótalesing og tað, sum hevur við notatión/uppskriving at gera* | Næmingurin kann syngja eitt lag í dur/mol tonaliteti við støði í eini givnari nótamynd. | Næmingurin hevur greinandi amboð til at greina eina lagagongd við atliti til at framføra hesi. | | |
| Rútma | | Næmingurin kann íðka eina rútmu við støði í eini givnari nótamynd við einum stabilum pulsi. | Næmingurin hevur greinandi amboð til at varnast ymisk rútmisk skap við atliti til at framføra hesi. | | |
| Harmonikkur | | Næmingurin kann syngja 3- og 4-klangir í ymiskum umvendingum. | Næmingurin hevur greinandi fatan av akkordbygnaði. | Næmingurin kann hoyra akkordir í einum funktiónsharmoniskum høpi. | Næmingurin hevur greinandi evni at kunna hoyra funktiónsharmoniskar gongdir. |
| Fyrisøgn | | Næmingurin er førur fyri at niðurskrivað eina framførda melodiska/rútmiska gongd. | Næmingurin hevur greinandi fatan til at niðurskriva lag og rútmu. | | |

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2 + 3: Fimismál | Ár 2 + 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|
| Innara tónhoyrn | | Næmingurin hevur so væl menta innara tónhoyrn, at henda stuðlar arbeiðinum innan einhvørja tónlistaliga disiplin. | Næmingurin hevur eitt tilvit um innaru tónhoyrnina og veit, hvussu henda verður styrkt uppaftur meiri. | | |

# ÁSTØÐI

## Endamál

Menning av tónleikaástøðiligu fatanini og praktisku nýtsluni hjá næminginum

## Innihald

- nótaskrift
- tónasløg og tónastigar
- harmonikkur
- koralharmonisering

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2 + 3: Fimismál | Ár 2 + 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|
| Nótaskrift | *Næmingurin hevur eina trygga tónleikaástøðiliga fatan, og dugir at brúka hana í praksis.* | Næmingurin er førur fyri at skriva eina lesiliga nótamynd út frá klassiskari nótaskriftsvenju. | Næmingurin hevur eina grundleggjandi fatan av tónleikanótaskrift. | Næmingurin er førur fyri at lesa ymsar lyklar og transponeraði ljóðføri. | Næmingurin hevur vitan um lyklar og transponeraði ljóðføri. |
| Tónasløg og tónastigar | | Næmingurin er førur fyri at eyðmerkja diatonisk tónasløg og tónastigar. | Næmingurin hevur vitan um tónasløg og bygnaðin í ymsum tónastigum. | | |

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2 + 3: Fimismál | Ár 2 + 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|
| Harmonikkur | | Næmingurin er førur fyri at lesa akkordir. | Næmingurin hevur vitan um uppbygnaðin í akkordum. | Næmingurin er førur fyri at gera funktiónsgreining av eini harmoniskari gongd. | Næmingurin hevur vitan um funktiónir og funktiónsgreining. |
| Koralharmonisering | | Næmingurin er førur fyri at gera eina koralharmonisering í einføldum koralstíli (útfylling av millumrøddum). | Næmingurin hevur vitan um reglar fyri koralharmonisering í einføldum koralstíli. | | |

## TÓNLEIKAKUNNLEIKI

### Endamál

Menning av tónleikaliga tilvitinum hjá næminginum við atliti at evnunum at kunna uppliva, fata og orða seg um ymisk tónlistalig úttrykk og sjangrur - bæði í søguligum og greinandi perspektivi.

### Innihald

Við støði í ítøkiligum tónleikadømum verður arbeitt við:

- Tónleikasøgu
- Formlæru

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 2 + 3: Førleikamál | Ár 2 + 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|
| Tónleikasøga | *Næmingurin hevur yvirlit yvir ymisk tónlistalig úttrykk og sjangrur í bæði søguligum og greinandi perspektivi.* | Næmingurin er førur fyri at kenna aftur við tónlistalig eyðkenni í ymsu tónleikasøguligu tíðarskeiðunum. | Næmingurin hevur vitan um tónlistaligu menningina í tónleikasøguligum perspektivi. |
| Formlæra | | Næmingurin er førur fyri at hoyra og kenna aftur tónlistaligan form í tónleiki - á skrift eins og auditivt. | Næmingurin hevur vitan um formlæru og brúkið í ymsum sløgum av klassiskum tónleiki. |

# RÚTMISK DEILD

## HØVUÐSLJÓÐFØRI

**Endamál**

Menning av tekniska, tónlistaliga og improvisatoriska fiminum hjá næminginum á høvuðsljóðførinum. Dentur verður lagdur á at menna næmingin sum solist og ljómliðsleikara.

**Innihald**

Tónlistaliga tilvitið, úttrykkið og tekniska yvirskotið hjá næminginum verður ment gjøgnum virki við:

- tónlistaligum úttrykki
- tekniskum fimi
- venjingarteknikki
- improvisatión

- skapandi tónlistaligum fimi
- sjangrukunnleika og sjangrufatan
- framførslu og miðlan

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónlistaligt úttrykk | *Næmingurin er tilvitaður um egið persónligt tónlistaligt úttrykk og dugir at íðka og menna tað.* | Næmingurin kann spæla við persónligum úttrykki. | Næmingurin er tilvitaður um ymiskar tónlistaligar og ljóðførinum viðkomandi listabúnar. | Næmingurin kann meta um og menna egið tónlistaligt úttrykk. | Næmingurin er tilvitaður um tørvin á sjálveftirmeting. | | |
| Teknisk fimi | *Næmingurin kann íðka tónleik við sannførandi ljóðføristeknikki og hóskandi kropsnýtslu.* | Næmingurin kann spæla við sannførandi teknikki. | Næmingurin er tilvitaður um teknisku møguleikarnar og avbjóðingarnar í ljóðførinum. | Næmingurin kann spæla við hóskandi nýtslu av kroppinum. | Næmingurin er tilvitaður um ergonomi. | Næmingurin kann sameina tónhoyrn, motorikk og ljóðføri | Næmingurin er tilvitaður um samanhang millum tónhoyrn, motorikk og ljóðføri |
| Venjingarteknikkur | *Næmingurin kann venja verk sjálvur og saman við øðrum, eins og meta um og bøta um egið avrik.* | Næmingurin kann venja sjálvstøðugt og í bólki. | Næmingurin hevur vitan um viðkomandi háttaløg at tilogna sær og venja nýtt tilfar við. | Næmingurin kann ráðleggja og gjøgnumføra royndir/venjingar í bólkahøpi. | Næmingurin fatar egnan leiklut í tónleikasosialum dynamikkum. | Næmingurin kann grunda yvir egnan lut og leiklut. | Næmingurin hevur kunnleika til at menna sína venjing. |

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Improvisatión | *Næmingurin kann útinna improvisatión á sannførandi hátt við greiðari fatan av melodiskum, harmoniskum, rútmiskum og formligum samanhangum og við greiðari miðlan av tónlistaligum stíli.* | Næmingurin kann improvisera innanfyri ella uttanfyri ein sjangruligan karm. | Næmingurin hevur kunnleika til improvisatión sum eitt týðandi element í ymiskum tónlistaligum sjangrum og er tilvitaður um ymiskar improvisatoriskar tilgongdir. | Næmingurin kann improvisera sum liður í eini skapandi tónlistaligari gongd og viðurkennir improvisatión sum eina grundtreyt í rútmiskum tónleiki. | Næmingurin kennir til improviserandi og spælandi tilgongdir til tónlistaliga útinnan og menning. | | |
| Skapandi tónlistaligt fimi | *Næmingurin kann skapa, niðurskriva og miðla egnan tónleik og sam* | Næmingurin kann sjálvstøðugt skapa tónlistaligt innihald at nýta í egnari tónlistaligari menning, venjing og framførslu. | Næmingurin hevur kunnleika til hættir at skapa tónleik og arbeiða kreativt við tónleikaligu luteindunum. | Næmingurin kann samvirka kreativt í tónlistaligum samanhangum. | Næmingurin er tilvitaður um kreativt samspæl. | Næmingurin kann niðurskriva egnan tónleik við at brúka nótar, talseting osfr. | Næmingurin hevur kunnleika til vanligar notatiónsformar. |
| Sjangrukunnleikki og sjangrufatan | *Næmingurin kann spæla sjálvstøðugt og skikkað í mun til tónlistaligar sjangrur og siðvenjur.* | Næmingurin kann menna sín egna tónlistaliga profil gjøgnum virkið samspæl við ymsar sjangrur og siðvenjur. | Næmingurin hevur kunnleika til ymiskar tónlistaligar sjangrur og siðvenjur. | | | | |

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Framførsla og miðlan | *Næmingurin kann á sannførandi hátt forloysa sítt tónlistaliga úttrykk og miðla tónleik fyri áhoyrarum.* | Næmingurin dugir at standa seg í eini framførslustøðu. | Næmingurin hevur gjøgnum skeiðsgongdina fingið royndir innan framførslu. | | | | |

## RÚTMISKT SAMANSPÆL

### Endamál

Menning av fimi hjá næminginum sum tónleikari í einum ljómliði - bæði sum solistur og medspælari.
Fatan fyri leiklutinum hjá einstøku ljóðførunum í ljómliðnum, og evnini til at lurta og reagera uppá egið og annara spæl í samanspælsstøðuni.

### Innihald

- Tónlistaligir felagsskapir
- Tónlistaligu og samskiftisligu funksjónirnar hjá ljóðførinum
- Tónleikaskrá/repertoire, sjangrukunnleiki og sjangrufatan
- Framførsla og miðlan

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónlistaligir felagsskapir | *Næmingurin er førur fyri at seta í gongd og vera bindandi partur av tónlistaligum felagsskapum.* | Næmingurin megnar sjálvstøðugt at ráðleggja og gjøgnumføra venjing og framførslu. | Næmingurin hevur royndir við at taka stig til og allýsa egna ábyrgd. | Næmingurin kann virka í og styrkja netverkssambond. | Næmingurin er tilvitaður um tónlistalig netverk. | | |
| Tónlistaligu og samskiftisligu funksjónirnar hjá ljóðførinum | *Næmingurin kann á sínum ljóðføri stuðla og veita við listaligari styrki og fatan fyri tónlistaligum samanhangi og heild.* | Næmingurin kann virka sum bæði solistur og fylgispælari/medspælari. | Næmingurin er tilvitaður um sín ljóðførisliga leiklut við støði í tónlistaligari sjangru, stíli og treytum og samanseting hjá bólkinum. | Næmingurin kann virka sjálvstøðugt í nú-inum og taka loysandi tónlistaligar avgerðir. | Næmingurin viðurkennir týdningin av framtakshugi og sjálvstøði í nú-inum. | Næmingurin megnar at taka støðu til og hava virknan lut í eini tónlistaligari heild. | Næmingurin hevur fatan fyri tónlistaligum bygnaði og heild. |
| Tónleikaskrá, sjangrukunnleiki og sjangrufatan | *Næmingurin hevur royndir við útinnan av egnum og annara tónsetingum í einum stílistiskt umboðandi og fjølrbroyttum úrvali.* | Næmingurin kann menna sín egna tónlistaliga profil gjøgnum virkið samspæl við ymsar tónlistaligar sjangrur og siðvenjur. | Næmingurin kennir ymiskar tónlistaligar sjangrur og siðvenjur. | Næmingurin kann útinna egnar og annara tónsetingar í einari samanhangandi tónleikaskrá. | Næmingurin hevur roysndir í at útinna egnar og annara tónsetingar í einum fjølbroyttum sjangruúrvali. | | |
| Framførsla og miðlan | *Næmingurin kann á sannførandi hátt birta í sítt tónlistaliga úttrykk og miðla tónleik fyri áhoyrarum.* | Næmingurin dugir at standa seg í eini framførslustøðu. | Næmingurin hevur gjøgnum gongdina nomið kunnleika um framførslu. | Næmingurin kann brúka verandi og nýggjar pallar til tónlistaliga framførslu og útbreiðslu. | Næmingurin er tilvitaður um møguleikarnar í grundfestum og alternativum miðlahættum. | | |

# HJÁFAKSKLAVER

**Endamál**

At næmingar, sum ikki hava klaver sum høvuðsljóðføri, tilogna sær klaverfimi og yvirlit yvir klaverið á einum støði, sum ger tað gjørligt at brúka ljóðførið sum praktiskt hjálpartól og samstundis styrkir yvirskipaðu ástøðiligu/stílfrøðiligu fatanina hjá næminginum

**Innihald**

Gjøgnum arbeiði við viðkomandi tónleikastykkjum verða hesi ment:

- hóskandi teknikkur
- nótalesing, talsetingarspæl
- samskipan, klangur/dynamikkur
- fatan av tónlistaligum leiklutum

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Mál: Fimismál | Mál: Vitanarmál |
|---|---|---|---|
| Tónlistaligur profilur | *Næmingurin hevur klaverfimi og yvirlit yvir klaverið á einum støði, sum ger tað gjørligt at brúka ljóðførið sum praktiskt hjálpartól og samstundis styrkir yvirskipaðu ástøðiligu/stílfrøðiligu fatanina, umframt fatanina av harmonikki, samspælinum millum ymsar tónlistaligar leiklutir (fylgispæl, lag osfr.) og fleirraddan.* | Næmingurin kann brúka sítt klaverfimi á persónligan og sjálvstøðugan hátt, ið stílfrøðiliga og praktiskt spælir saman við yvirskipaðu málunum hjá nævingini í musikkskúla miðnámi. | Næmingurin er tilvitaður um brúksmøguleikar innan egið klaverfimi og kann sameina hesar í sínum savnaða tónlistaliga virki. |
| Praktisk nýtsla av klaverinum | | Næmingurin dugir at brúka sítt tillærda klaverfimi beinleiðis í viðkomandi samanhangum, og sum yvirlitsskapandi amboð í sínum tónlistaliga virksemi. | Næmingurin kennir til ymiskar brúksmøguleikar klaverinum viðvíkjandi, og tey haðani komnu krøvini til fimi innan viðkomandi sjangrur og stílsløg. |
| Klavertekniskt fimi | | Næmingurin hevur handverksligt fimi á grundstøði innan eitt breitt úrval av liðum innan klaverspæl (hóskandi teknikkur, nótalesing, talsetingarspæl, samskipan, klangur/dynamikkur osfr.) | Næmingurin er kunnugur við ymiskar venjingarteknikkir og framferðarháttir innan loysing av ymiskum sløgum av klaverrelateraðum uppgávum. |

## ÁSTØÐI & HOYRILÆRA

**Endamál við fakinum:**

Endamálið við fakinum er, umvegis tvørfakliga kobling, at hvessa tónleikaraliga medvitið hjá næmingum gjøgnum, at menna innaru tónhoyrnina umframt at styrkja evnini til at hava yvirlit yvir, miðla og tilogna sær tónleik.

**Innihald**

Tilognan av audtitivum, ástøðiligum og uppskrivingarligum fimi innan lagskipan (melodikk), rútmulæru og harmonikk

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Mál 2: Fimismál | Mál 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lag | *Næmingurin hevur eina sterka innaru tónhoyrn, tónleikaástøðiliga fatan, umframt viðkomandi uppskrivingarligt fimi/førleikar - og kann brúka hesi í síni tónlistaligu praksis.* | Næmingurin kann syngja eitt lag í dur/mol tonaliteti við støði í eini givnari nótamynd. | Næmingurin hevur greinandi amboð til at greina eina lagagongd við atliti til at framføra hesi. | Næmingurin kann hoyra og endurgeva lagabygnaðir og -gongdir. Næmingurin kann lesa, skriva og endurgeva lagabygnaðir og -gongdir. | Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir auditivar lagabygnaðir og -gongdir. Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir uppskrivaðar lagabygnaðir og -gongdir. | Næmingurin kann miðla og hevur eina ástøðiliga fatan av lagabygnaði og -gongdum. Næmingurin kann improvisera/tónseta lagabygnaðir og -gongdir. | Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir ástøðið handan lagabygnaðir og -gongdir. Næmingurin hevur vitan um, og kann grunda yvir lagaimprovisatión og tónseting. |
| Rútma | | Næmingurin kann íðka eina rútmu við støði í eini givnari nótamynd við einum stabilum pulsi. | Næmingurin hevur greinandi amboð til at varnast ymisk rútmisk skap við atliti til at framføra hesi. | Næmingurin kann hoyra og endurgeva rútmiskar bygnaðir og gongdir. Næmingurin kann lesa og endurgeva rútmiskar bygnaðir og gongdir. | Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir auditivar rútmiskar bygnaðir og gongdir. Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir uppskrivaðar rútmiskar bygnaðir og gongdir. | Næmingurin kann miðla og hevur eina ástøðiliga fatan av rútmiskum bygnaðum og gongdum. Næmingurin kann improvisera/tónseta rútmiskar bygnaðir og gongdir. | Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir ástøðið handan rútmiskar bygnaðir og gongdir. Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir rútmiska improvisatión og tónseting. |

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Mál 2: Fimismál | Mál 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Harmonikkur | | Næmingurin kann syngja 3- og 4-klangir í ymiskum umvendingum Næmingurin er førur fyri at niðurskrivað eina framførda melodiska/rútmiska gongd | Næmingurin hevur greinandi fatan av akkordbygnaði.<br><br>Næmingurin hevur greinandi fatan til at niðurskriva lag og rútmu. | Næmingurin kann hoyra og endurgeva harmoniskar bygnaðir og gongdir. Næmingurin kann lesa og endurgeva harmoniskar bygnaðir og gongdir. | Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir auditivar harmoniskar bygnaðir og gongdir. Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir uppskrivaðar harmoniskar bygnaðir og gongdir. | Næmingurin kann miðla og hevur eina ástøðiliga fatan av harmoniskum bygnaðum og gongdum. Næmingurin kann improvisera/tónseta harmoniskar bygnaðir og gongdir. | Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir ástøðið handan harmoniskar bygnaðir og gongdir. Næmingurin hevur vitan um og kann grunda yvir harmoniska improvisatión og tónseting. |

# FRAMLEIÐSLUDEILD

## Høvuðsfak sangskriving

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skapandi gongdir | *Næmingurin kann á sannførandi hátt samantvinna háttalag og praksis í síni sangskriving.* | Næmingurin kann sniðgeva, birta og gjøgnumføra skapandi gongdir. | Næmingurin hevur vitan um skapandi arbeiðsháttaløg. | Næmingurin kann grunda yvir praksis og val av háttalagi í mun til egið listarligt virksemi. | Næmingurin er tilvitaður um skapandi gongdir í mun til sangskriving. | | |

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rútmisk tónseting | *Næmingurin kann úttrykkja seg listaliga við at brúka tónlistalig virknaðarmiðlar.* | Næmingurin kann ala fram tónsetingarlig hugskot. | Næmingurin er tilvitaður um háttaløg til tónlistaliga hugskotsframleiðslu. | Næmingurin kann fremja tónlistaligar avgerðir og metingar á einum greinandi grundarlagi. | Næmingurin hevur vitan um tónlistaligar virknaðarmiðlar. | Næmingurin kann taka støðu til melodiskar, harmoniskar og útsetingarttekniskar bygnaðir. Næmingurin kann taka listaligar avgerðir í tónsetingarliga arbeiðinum. | Næmingurin kennir til lagaskipan. harmonikk og útsetingarteknikk. Næmingurin hevur fatan fyri teimum tónsetingarligu elementunum og tí fagurfrøðiliga úttrykkinum. |
| Lýrikkur | *Næmingurin megnar at úttrykkja seg persónliga gjøgnum lýrikk.* | Næmingurin kann ala fram tilfar til at skapa lýrikk. | Næmingurin er tilvitaður um háttaløg til lýriska hugskotsframleiðslu. | Næmingurin kann fremja lýriskar avgerðir og metingar á einum greinandi grundarlagi. | Næmingurin hevur vitan um lýriskar virknaðarmiðlar. | Næmingurin kann taka støðu til bygna í lýrikki. Næmingurin kann taka listalig val í sambandinum millum lýrikk og tónleik. | Næmingurin er kunnugur við form og frásøguteknikk. Næmingurin hevur fatan fyri samspælinum millum lýrikk og tónleik. |
| Miðlan | *Næmingurin kann á sannførandi hátt miðla sína listaligu ætlan.* | Næmingurin kann gerast partur av tónlistaligum samstarvum. | Næmingurin hevur fatan av sínum leikluti og síni ábyrgd í einum tónlistaligum samanhangi. | Næmingurin kann arbeiða við tíðarhóskandi miðlanarpallum. | Næmingurin hevur kunnleika til miðlanarpallar sum eru tónleiki viðkomandi. | Næmingurin kann úttrykkja seg fakliga og fagurfrøðiliga. | Næmingurin hevur grundleggjandi vitan um viðkomandi fakhugtøk og fagurfrøðiligar virknaðarmiðlar. |

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Verkætlanir | *Næmingurin kann arbeiða innan karmarnar í eini verkætlan.* | Næmingurni kann arbeiða við atliti at verkætlanum. | Næmingurin hevur vitan um og fatan av arbeiðsumstøðu num í eini verkætlan. | Næmingurin kann birta og gjøgnumføra eina tónlistaliga verkætlan. | Næmingurin hevur grundleggjandi vitan um verkætlanarleiðslu. | | |

## Høvuðsfak tónseting (rútmiskt / klassiskt )

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1:  Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónleikasøga | *Næmingurin er tilvitaður um tónleikasøguna og fatar sína egnu staðseting í hesum.* | Næmingurin kann tengja síni tónlistaligu og teknisku evni at søguligum verkum og skapa nýggjan tónleik við støði í síni vitan um tónleikasøguna. | Næmingurin er tilvitaður um ymiskar fagurfrøðiligar kósir og teirra innanhýsis samband. | Næmingurin kann í ávísan mun greina og fata verk í mun til teirra samtíð. | Næmingurin hevur eina fagurfrøðiliga vitan um tónleikasøgu og megnar at útpeika týðandi grip og teknikkir, sum eru grundarlag fyri tónleikinum. | | |

| Førleikaøki | Yvirskipað førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál | Ár 3: Fimismál | Ár 3: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónseting | *Næmingurin kann menna original tónlistalig hugskot og úttrykk og megnar at umseta hugskotini til ítøkilig verk.* | Næmingurin kann tónseta tónleik við støði í egnum ætlanum og til ítøkiligar samanhangir og megnar at seta sín tónleik í eitt fagurfrøðiligt høpi. | Næmingurin hevur vitan um ymiskar tónsetingarhættir og er tilvitaður um sínar egnu arbeiðsgongdir. | Næmingurin kann draga háttaløg og íblástur við atliti at hugskotum inn í sín tónsetingarteknikk. | Næmingurin kann tilogna sær vitan við at lurta og lesa um háttaløg og fagurfrøðilig val í fakbókmentum og annara verkum, umframt umvegis kunning í øðrum listagreinum. | Næmingurin kann vera partur av samstørvum við tónleikarar og onnur um framførslur og/ella greiða og framføra síni egnu verk og er tilvitaður um fagurfrøðiligar avgerðir í samband við framførslur. | Næmingurin hevur tilvit um egnar ætlanir fyri sítt tónsetingarliga virksemi í einum samanhangi viðvíkjandi framførslu. |
| Tekniskt | *Næmingurin er førur fyri at velja teknikkir og snið sum skulu til fyri at listaligu hugskotini kunnu avrikast á best møguligan hátt.* | Næmingurin kann skriva eitt nótarit ella á annan viðkomandi hátt halda fast við og miðla sínar tónsetingar. | Næmingurin hevur ein skipaðan kunnleika til nótaskrift, ljóðføri og grundleggjandi upptøkutøkni. | Næmingurin kann brúka eitt nótaforrit, og/ella aðra viðkomandi ritbúna innan hansara/hennara virki. | Næmingurin fatar møguleikar og avmarkingar í amboðunum og er før/ur fyri at stýra smidliga í teimum. | | |
| Miðlan | *Næmingurin kann úttrykkja seg fyri einari yvirskipaðari áhoyrarafjøld um, hvussu tónleikurin hjá viðkomandi er skaptur og gera greitt hvørji hugskot reka tónleikin.* | Næmingurin kann úttrykkja tað grundleggjandi hugskotið í sínum verkum í bæði einum fakligum og einum ikki-fakligum samanhangi. | Næmingurin hevur vitan um yvirskipaði tónlistalig hugtøk og megnar at miðla hesi í einum ikki fakligum samanhangi. | Næmingurin kann miðla sína teknisku nýtslu í einum skipaðum formi. | Næmingurin er tilvitaður um námsfrøðilig aspekt í tónleikaundirvísing gjøgnum samtalur og metan av egnari undirvísing. | Næmingurin kann seta sín tónleik í eitt breiðari perspektiv og hevur ment eina fatan av leiklutinum hjá listini í samfelagnum. | Næmingurin er kunnigur við rák í øðrum listagreinum og mentanarpolitikki. |

# FELAGS FYRI ALLAR DEILDIR

## RÚTMISK SAMSKIPAN

(verður tikið sum partur av kórundirvísingini)

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|
| Teknisk fimi | *Næmingurin útinna tónleik við sannførandi rútmiskum og samskipanarligum fimi, bæði í íðkanini av fakinum SSB og á sínum høvuðsljóðføri* | Næmingurin er førur fyri at útinna tónleik við tryggari kenslu fyri pulsi og undirdeilingum.Rútmiska outputtið hjá næmingum, sum byggir á tryggleika í mun til grounding, kropsliga undirdeilskenslu og samskipanarfimi | Næmingurin er tilvitaður um puls og undirdeilingar. Næmingurin er tilvitðaur um sítt rútmiska output | Næmingurin er førur fyri at brúka polyrútmisk og polymetrisk element í síni tónlistaligu útinnan. Næmingurin er førur fyri at lesa og brúka rútmisk nótavirði í síni útinnan. | Næmingurin hevur kunnleika til eina røð av polyrytmiskum og polymetriskum elementum. Næmingurin hevur kunnleika til og fatan av gagninum og virðinum í nótum. |
| Tónlistaligt úttrykk | *Næmingurin er førur fyri at miðla eitt rútmiskt aspekt sum en munandi og sannførandi part í sínum tónlistaliga úttrykki.* | Næmingurin er førur fyri at brúka tað kropsliga aspektið sum part av sínum tónlistaliga úttrykki. | Næmingurin hevur kunnleika til háttaløg til nýtslu av kropsliga aspektinum sum part av einum savnaðum tónlistaligum úttrykki. | Næmingurin er í síni útinnan førur fyri at brúka elementir frá tónlistaligum mentanum, har tað at spæla tónleik og dansa er tvær síður av somu søk. | Næmingurin hevur kunnleika til tónlistaligar mentanir, har tað at spæla tónleik og dansa er tvær síður av somu søk. |

| Førleikaøki | Yvirskipaði førleikamál | Ár 1: Fimismál | Ár 1: Vitanarmál | Ár 2: Fimismál | Ár 2: Vitanarmál |
|---|---|---|---|---|---|
| Improvisatión og skapandi tónlistaligir førleikar | *Næmingurin er førur fyri at improvisera og skapa tónleik við háttaløgum, sum hava støði í nýtsluni av kroppi og rødd, og sum eisini kunnu brúkast á høvuðsljóðførinum hjá næminginum.* | Næmingurin er førur fyri at improvisera við at brúka kropp, rødd og ljóðføri. | Næmingurin hevur kunnleika til háttaløg innan improvisatión við nýtslu av kroppi, rødd og ljóðførum. | | |
| Samstarv / sosialir førleikar | *Næmingurin hevur førleikar at gerast partur av bindandi, tónlistaligum felagsskapum.* | Næmingurin kann geva ískoyti til einstøk úttrykk og vera partur av einum kollektivum úttrykki. | Næmingurin hevur fatan fyri týdninginum av samspælinum millum einstaklingin og kollektivið í útinnanini av tónleiki í bólkahøpi. | Næmingurin hevur góð samskiftsevni í einum tónlistaligum samanhangi. Næmingurin er førur fyri at taka medábyrgd fyri bólksins savnaða úttrykki. | Næmingurin er tilvitaður um samskifti í einum tónlistaligum samanhangi. Næmingurin er tilvitaður um týdningin av at taka medábyrgd fyri bólksins savnaða úttrykki |